# Drelnes er nýtt garnaskip í Suðuroy

**Drelnes, sum er fyrrverandi Jónrit, hevur garnaloyvið hjá Ólavi Hvíta, sum Niels Jakku Nielsen á Strondum keypti til endamálið. Upprunaliga er hetta ísfiskatrolarin, Akraborg, sum áður hevur havt heimstað í Vági, Sørvági og Leirvík**

HÁTÍÐARHALD
*Orð: Vilmund Jacobsen*
*Myndin: Leivur Nygaard*
*vilmund@sosialurin.fo*

Týsdagin um 17-tíðina legði garnaskipið, Drelnes, sum Gudmund Mortensen hevur keypt av Strondum, til bryggju á Tvøroyri.

Væl av fólki var samankomið til móttøkuna, sum varð hildin í fagrasta veðri – við hornatónleiki og røðu.

Tá ið tann formelli parturin av móttøkuni var av, bjóðaði reiðarin øllum umborð at síggja skipið. Blíðskapurin var stórur, bæði við góðgæti og onkrum leskandi til stór og smá.

Drelnes er fyrrverandi Jónrit, sum Niels Jakku Nielsen á Strondum seinastu árini hevur átt. Strandingurin hevur áður átti eina aðra Jónrit, sum var ein sonevndur skittfiskabátur. Hesi skip endaðu sínar dagar í Norðsjónum, tá ið tey ikki longur sluppu at fiska í føroyskum sjógvi.

Drelnes – ella Jónrit – er fyrrverandi trolarin Akraborg, sum Niels Jakku læt umbyggja til garnaskip. Upprunaliga er hetta ísfiskatrolarin, Akraborg, sum áður hevur havt heimstað í Vági, Sørvági og Leirvík.



*Væl av fólki var samankomið á bryggjuni á Tvøroyri til hátíðarløtuna, tá ið garnaskipið, Drelnes – fyrrverandi Jónrit – legði til bryggju í góðveðrinum seinnapartin týsdagin*



*Gudmund Mortensen, reiðari, beyð øllum umborð at síggja Drelnes, sum hevur eina snotuliga apetering. Seinni verður skrokkurin sandblástur og málaður*

### Góð apetering

At síggja til uttan, krevur skipið eina hond, men øll apeteringin er í góðum standi og er sera snotulig.

Drelnes hevur loyvi at fiska svartkalva og havtasku. Skipið hevur veiðiloyvið hjá Ólavi Hvíta, sum Niels Jakku keypti til endamálið.

Gudmund Mortensen og hansara menn eiga nú tvey garnaskip, Nim og Drelnes, umframt djúpvatnstrolararnar, Rankan og Rasmus Effersøe, sum er fyrrverandi Snoddið, ið toftamenn á sinni lótu byggja.

Einir 10-11 mans verða við Drelnesi, og sum skilst, fylgja nakrir av gomlu manningini við skipinum, sum nú hevur heimstað á Tvøroyri.

### Ringvirkningar

Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri, sum helt røðu við hátíðarløtuna, fegnast um, at Suðuroyggin nú eigur eitt skip og veiðiloyvi aftrat.

– Eitt slíkt arbeiðspláss hevur stóran týdning fyri bygdina og fyri oynna sum heild, tí ringvirkningarnir eru so nógvir – og nógv fleiri, enn vit hugsa um, sigur hann.

Hann vísir á, at Tvøroyri hevur hildið rímiliga fast um skipini, sum hann tekur til.

– Í apríl kom línuskipið, Hoyvíkingur, sum júst er settur í stand og nútímansgjørdur, til bygdina. Hoyvíkingur hevur leingi havt nært tilknýti til bygdina gjøgnum Delta-menninar, men nú er skipið so eisini heimahoyrandi her suðuri við Marneri Lisberg sum reiðara, sigur Kristin.

Kristin Michelsen sigur, at Hoyvíkingur hevur verið heimahoyrandi á Sandi, men er í dag einasti línubátur av hesi støddini, sum hevur heimstað í Suðuroy.



*Drelnes er fyrrverandi garnaskipið Jónrit, sum aftur er fyrrverandi ísfiskatrolarin, Akraborg*

## FAKTA UM DRELNES

| | |
|---|---|
| **Smíðiár:** | 1961 |
| **Smíðistaður:** | Brattvåg, Noreg |
| **Umbyggingar:** | Skála (1969) |
| **Longdur:** | Skagen (1982) |
| **Tilfar:** | Stál |
| **BRT:** | 304,6 |
| **NRT:** | 103,55 |
| **Deyðvekt:** | 100 tons |
| **Maskina:** | Alpha Diesel 700 hk |

# Kristin ynskti vinnulívinum bjarta framtíð

HÁTÍÐARHALD
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í røðu síni á bryggjuni á Tvøroyri, vísti borgarstjórin, Kristin Michelsen á, at tað í ár eru liðin 148 ár, síðan stóri slóðbrótarin í føroyskum vinnulívi, Jóhan Mortensen, byrjaði sítt handilsvirki á Tvøroyri.

– Hesin víðskygdi maður var langt frammanfyri sína tíð. Hann byrjaði bæði innanoyggja-og uttanlandssigling. Á henda hátt gjørdi hann Tvøroyri til sjálvan krumptappin í vinnulívinum her á landi.

Hann segði, at sum borgarstjóri í Tvøroyrar kommunu er tað honum ein heiður at ynskja oldurabbasoninum hjá Jóhan, Gudmundi Mortensen, hjartaliga tillukku við enn einum fiskifari.

– Gamalt er, at tað eru sjey góð ár og sjey rak ár. Tað er ein eydna fyri okkara bý, at tú hevur áræði og dirvi at bróta upp armar og leggja til brots – til frama fyri land og fólk.

Kristin vísti á, at Gudmund hevur hetta dirvi og áræði – eisini í tíðum sum hesum, nú fiskivinnan liggur í tungum sjógvi, eina mest av methøgum oljuprísum.

– Vit, sum búgva í syðsta enda av landinum, mugu síggja í eyguni, at vit eru – og koma í mong ár aftrat koma at vera – ein útjaðari í Føroyum. Somuleiðis mugu vit síggja í eyguni, at tað verður fiskivinnan, sum kemur at vera okkara høvuðsvinna.

Borgarstjórin segði, at navnið, Drelnes, er gamalt navn í fedranna reiðaríi, sum hann tók til.

– Tvøroyrar býráð ynskir skip, manning og reiðaríi góðan byr og Guðs signing.

Í røðu síni bað Kristin eisini umbering fyri, at eingin úr býráðnum møtti, tá ið Hoyvíkingur kom inneftir Trongisvágsfirði við TB á bógnum.

– Tí vil eg eisini nýta høvi at ynskja hesum fari, manning og reiðaríi góða byr og Guðs signing.

Áðrenn hann endaði við at lesa upp eitt sálmaørindi eftir Gudmundi Bruun, ynskti hann øllum, sum varða av vinnulívinum í Tvøroyrar kommunu, eina bjarta framtíð.

– Ofta skulu tung tøk takast, og tá krevst áræði og dirvi. Eg havi ta álit á vinnulívsfólkunum her á staðnum, at tit megna at taka hesi tøk, segði Kristin Michelsen, borgarstjóri.



*Borgarstjórin í Tvøroyrar kommunu, Kristin Michelsen, ynskti Drelnesi og Hoyvíkingi vælkomnum til bygdar Mynd: Leivur Nygaard*